Serstøk viðurkenning

Dómsnevndin, sum velur Ársins Virki og Vinnuátakið, hevur í ár ynskt at geva eina serstaka viðurkenning til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna v/ Debes H. Christiansen fyri tað megnar arbeiðið, sum varð gjørt í s.v. Korona farsóttina. Áðrenn nakar í Føroyum gav sær stórvegis far um eina lúrandi heimsfarsótt fyrireikaði Debes saman við øðrum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni seg uppá at vera klár, um tað gjørdist neyðugt. Og vit mugu bara staðfesta, at tað gjørdist neyðugt!

Tað munnu verða fáir føroyingar, sum ikki hava hoyrt søguna um, hvussu royndirnar við at greina laksasjúkuna ILA vórðu nýttar sum grundarlag fyri at greina koronukanningar, tá farsóttin av fyrstan tíð rakti. Mærsk Mckinney Møller, sáli, hevði verið stoltur av tí rættstundis nærlagni, sum varð sýnt í hesum føri.

Debes arbeiddi saman við øðrum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni nátt og dag at greina kanningar, og var arbeiði teirra eitt av týdningarmiklastu stigunum í bardaganum móti koronafarsáttini her á landi. Henda eldhuga og hetta nærlagni hevur dómsnevndin valt at heiðra við einari serstakari viðurkenning.